# Føroyskur korallfiskiskapur heimskendur

EYÐFINN MAGNUSSEN
Biologur,
Fróðskaparsetur
Føroyar

**Føroyskir fiskimenn oyðileggja tilvitað økir á leiðunum kring Føroyabanka. Hetta verður gjørt við, at ketur verða loraðar niður á botnin og síðani togaðar eftir botninum í millum tvey skip**

Hetta kann lesast í einari enskt skrivaðari lærubók, sum vit nýta í lívfrøðisútbúgvingini á Fróðskaparsetrinum, og sum eisini verður nýtt á universitetum kring allan heimin. Tí er kunnleikin hjá útlendingum um, hvussu vit føroyingar ávirka botnin við okkara fiskiskapi helst munandi størri, enn vit veruliga geva okkum far um.

**Tjaksendingin í SVF**
Í tjaksendingini eftir Dag og Viku mánakvøldið 26. februar var tjakast um evnið "Hóttar korallir". Í sjónvarpsstovuna hevði verturin fingið Jan Sørensen, leiðara á BIOFAR og Viberg Sørensen, formann í Føroya Reiðarafelag. Útgangsstøðið í sendingin var nýútkomna frágreiðing hjá ST umhvørvisstovninum UNEP, "IN DEAD WATER. Merging of climate change with pollution, over-harvest, and infestations in the world's fishing grounds". Frágreiðingin umrøður havbotnin og teir týdningarmestu fiskastovnarnar í heiminum, og hvussu hesir verða ávirkaðir av fólki. Í frágreiðingini vísa teir á, at veðurlagsbroytingar hótta korallirnar um allan heimin, men siga samstundis, at fiskiskapur við botntroli er ein onnur stór hóttan í móti korallunum.

**Føroyskar korallir ikki ókendar úti í heimi**
Í sendingini segði Viberg Sørensen, at ST-fólkini, sum høvdu skrivað frágreiðingina, neyvan høvdu hoyrt um Føroyar. Men føroyskar korallir er tó valla so ókendar úti í heimi, sum Viberg Sørensen letur okkum vita.

**Føroyskur trolfiskiskapur pensum í lívfrøðisútbúgvingum**
Í lívfrøðisútbúgvingini á Fróðskaparsetrinum hava vit eitt fak, sum eitur "Fiskalívfrøði".
Umframt ta vanligu lívfrøðina hjá fiski, koma vit eisini inn á, hvussu fiskiskapur ávirkar fiskastovnar og hvussu botnurin verður ávirkaður av fiskireiðskapi. Lærubókin, sum vit nýta, eitur "Marine Fisheries Ecology". Bókin er skrivað av trimum viðurkendum enskum vísindamonnum, og verður brúkt í undirvísingini í fiskalívfrøði á nógvum universitetum kring heimin, bæði í Norðurevropa og Norðuramerika.
Kapittul 14 viðger evnið "Impact on bentich communitees, habitats and coral reaf" (Ávirkanin á botnsamfeløg, búøkið og korallriv). Her verður víst á, at fiskimenn í summum førum miðvíst "rudda" botnin og beina burtur lutur, ið tarnar fiskiskapinum: Eitt hugtak, sum bókin speiskliga sigur, at fiskimenninir kalla "at gera botnin kláran". Sum dømi um hetta, vísa teir á, hvussu gjørt hevur verið í Føroyum. Á blaðsíðu 277 í lærubókin verður sagt

*"Føroyskir fiskimenn oyðileggja tilvitað økir á leiðunum kring Føroyabanka, har stórur svampar vaksa á botnunum (ostabotnur). Hetta verður gjørt við, at ketur verða loraðar niður á botn og síðani togaðar eftir botninum í millum tvey skip. Tibetur góvust fiskimenninir við hesum, tá vísindafólk vístu á, hvussu stóran týdning hesi økini høvdu sum uppvakstrarøki hjá smáum toski".*
Hesa søguna hoyra á hvørjum ári í hundraðvís av studentum kring heimin. Hóast tað í hesum føri er talan um ostabotn, sum verður oyðilagdur, so eiga vit ikki at kenna okkum alt ov trygg og halda, at vit kunnu liva og láta sum vit vilja við okkara korallrivum.

**Øktur áhugi fyri korallum**
Hesin seinru árini er tilvitanin um korallir munandi vaksin í millum fólk; eisini her í Føroyum. Korallirnar eru í stórari minking, og umheimurin heldur eisini eitt vakið eygað við, hvat ið fyriferst, eisini her í Føroyum. Hetta, hóast at vit sjálvi halda okkum vera lítlar og tí kunna krógva okkum her úti í Norðuratlantshavinum.
Hendan tilvitanin um korallir er tí helst eisini grundin til, at World Wildlife Fundation (WWF) í 2003 heitti á Føroyskar myndugleikarnar um at víðka um trolfría økið á Føroyabanka, so hetta bleiv flutt frá núverandi 200m dýpdarkurvuni, til eisini at fevna um økið niður av hellingin av Bankanum. Hetta hevði gjørt, at korallirnar kring Bankan vórðu vardar í móti troli. Í brævinum til Fiskimálaráðið vísti WWF á, at gjørdu vit hetta, so handlaðu vit eftir OSPAR sáttmálanum, sum Føroyar hava undirskrivað.




Í hesum sáttmálanum hava Føroyar millum annað bundið seg til at verja havumhvørvið móti skaðaárinum, sum kunnu standast av mannaávum.
Hesi bæði dømini vísa týðuliga, at umheimurin fylgir væl við hvussu korallirnar kring Føroyar verða ávirkaðar av okkara fiskiskapi, og tí ikki eru duldar, sum Viberg Sørensen lat okkum vita í sjónvarpssendingini mánakvøldið.

# Góðu vinir, kenningar og sjúklingar

JENIS Á RANA



... ein heilsan í sambandi við tíðindaskriv frá fútanum í dag.
Í tíðindaskrivi í dag boðar Karen Marie Olsen frá, at " der kan forventes rejst tiltale mod Jenis av Rana" ved Færøernes ret.
Talan er um fyrsta samband fútans við meg, síðani málið byrjaði fyri skjótt tveimum árum síðani. Tá varð eg av fjølmiðlum o.ø. m.a. skuldsettur fyri at hava brotið tagnar- og fráboðanarskylduna til barnaverndina.

**Í brævi til tykkara í okt. 2006 skrivaði eg m.a.:**
*... tagnarskyldan er ikki brotin av mær.*
*... fráboðanarskyldan er ikki brotin av mær.*
*... onnur atlit og áhugamál eru ikki tikin framum atlitini til sjúklingar í viðtalu mínari.*

Av fráboðan fútans sæst, at skuldsetingini um, at eg skal hava brotið tagnarskylduna, er slept. Hetta er at gleðast um.
Tó ætlar ákærumyndugleikin, at Føroya rættur skal døma meg, tí eg ikki havi boðað frá kunnleika mínum til misnýtslu av einum sjúklingi. Lat meg enn einaferð vissa teg um, at eg ongan slíka vitan havi havt. Um so var, hevði eg ikki drálað við at boða frá hesum, ikki bert tí tað hevði verið lógar-, men eisini moralska skylda mín.
Føroya rættur verður sostatt biðin døma meg fyri eina vitan, sum eg ikki havi havt.
Hin 28. juni kom sami rættur annars til ta niðurstøðu, at hendan misnýtsla ongantíð var framd. Aftanfyri dómin lógu mánaðarlangar kanningar og avhoyringar. Til sammetingar tekur ein vanlig læknaviðtala millum 10 og 30 minuttir. Rætturin fríkendi ákærda fyri ta misnýtslu, sum eg nú verið sagdur hava havt kunnleika til.
Tíverri vænti eg ikki, at eg teir komandi dagarnar megni at røkja viðtaluna til fulnar, og havi eg boðað fakfelag mínum frá hesum. Vóni tit bera yvir við mær- og at tit biðja fyri okkum.

**Bestu heilsanir**

# Landsstýrismaður í uttanríkismálum?

**Ymist er sum hesin fíni, nýggi tittul hevur verið sagdur ella skrivaður higartil. Uttanríkismálaráðharri, uttanríkisministari, landsstýrismaður í uttanríkismálum**

ROLF GUTTESEN



Felags er at orðið –ríki- er uppi í øllum. Sjálvt tá løgmaður eitt mánakvøld í januar, eftir langa bíðtíð í trongari stovu í Tinganesi, kungjørdi nýggja landsstýrið, brúkti hann orðið uttanríkis-. Og tað ber bara ikki til. Eingin ivi er um, at tað er púra medvitandi gjørt av Høgna Hoydal, at fáa hetta nýggja orðið inn. Einaferð enn hevur Jóannes Eidesgaard gjørt eina fadesu. Hví tað?
Tað er bara ein, ið umboðar Ríkið úteftir, og tað er Per Stig Møller. Tað kunnu aldri vera tveir, sum hava somu uppgávu og sama starv. Jú, men Hoydal umboðar Føroyar úteftir, vil onkur siga. Tað er møguligt, men Føroyar eru einki Ríki, men ein lítil landspartur í einum Ríki.
Hin vegin kann man taka hatta við uttanríkis- beint sum tað er sagt. Men so kann Hoydal ikki umboða Føroyaland mótvegis ríkisstjórnini í Keypmannahavn ella grønlendska sjálvstýrinum í Nuuk, tí hesir partar eru jú innanríkis-. Man tað vera tilætlað, at Eidesgaard hevur skorið hesar ríkispartar frá í starvslýsingini hjá Hoydal? Neyvan.
Nei, maðurin kann í mesta lagi vera landsstýrismaður í uttanlandamálum. Ella kanska í uttanoyggjamálum. So ber til at fara ein svipp til Áland, Öland, Hetland, Swaziland, Langeland, Lolland, Götaland og Norrland og Rogaland at samráðast. Ella kanska Cook oyggjarnar (skrivast Kukk-oyggjar?)
Jamen, er tað ein fadesa, at løgmaður brúkar hetta orðið, uttanríkis- ?. Ja, tí tað er skeivt. Á sama hátt sum Føroyar ongar sendistovur (ambassadur) hava, hvørki í Íslandi, Keypmannahavn, London ella Bruxelles, sjálvt um teir kalla tað sendistovur – so kann eingi landsstýrismaður umboða Ríkið úteftir. Soleiðis eru reglurnar bara.
Og Hoydal, sum elskar konfrontatión og at spæla fornermaður, fer at brúka ein hvønn tjans at gera seg upp til nakað, sum hann ikki er. Her eru nýggir møguleikar at forpesta sambandið við Danmark. Og so krevja uppbakning frá Eidesgaard.
Hetta boðar ikki frá góðum.

Lesið Sosialin - so eru tit við